# 1700 metrar til framtíðina



**Gásadalsvegurin**
er fyrstu ferð nevnt í politiskum høpi í 1961, men longu í 30'unum fóru menn úr Bø undir at gera ein veltingarveg úr bygdini og vestur móti Stelkaskorðum. Í 1979 varð byrjað uppá vegin móti tunlinum bíggjarmegin, og gásadalsmegin í 2003.

**Gásadalstunnilin**
er sum einbreytaður tunnil raðfestur fyrstu ferð í løgtingsmáli nr. 62 frá 1985, eftir at Kalsoyartunlunum og seinni eftir Kunoyartunlinum.

Fyrireikingin til tunnilsgerðina byrjaði í 2000. Árið eftir, hin 12. juli í 2001 lat Hervør Hergudóttir, fyrrverandi bygdaráðsformaður fyrsta skotið av fyri tunlinum. Síðani var tað Solberg Henriksen, fyrrverandi postmaður í Gásadali, sum lat seinasta skotið av á tollaksmessu í 2002.

Nú, tá ið tunnilin varð tikin í nýtslu í gjár, er Gásadalur knýtt at umleið 85% av landinum.

**Um tunnilin**
**Byggiharri:** Landsverk
**Tekniskur ráðgevi:** LBF og ETP Consult
**Arbeiðstakarar:** Landsverk, Byggitek og El-Teknik
**Kostnaður:** 41,4 mió kr.
**Longd:** 1446 metrar
**Breidd:** 3,5 metrar
**Frástøða millum víkipláss:** 150 metrar
**Vegur bíggjarmegin:** 400 metrar
**Vegur gásadalsmegin:** 850 metrar
**Spreingingar:** 290 skot
**Útsprongt:** 169.000 tons av gróti
**Spreingievni:** 134 tons
**Arbeiðstímar:** 41.000
**Nútíðin:** 1700 metrar til framtíðina!



*Teir fegnast um tunnilin og ljósini undir loftinum - vinstrumegin síggjast m.a. Jákup Suni Lauritsen, Bjarni Djurholm, Oyvindur Brimnes og Sune Jacobsen*




*1700 metrar til nútíðina*



*Fólk í Gásadali taka væl ímóti tunlinum*